# Søguligt tíðarskeið í s

**Nú Smyril Line hevur verið í tungum sjógvi, og stjórin øll árini fer av brúnni er ikki av leið at varpa ljós á, at tað seinastu 30 árini hevur eydnast at leggja lunnar undir siglingina í Norðuratlantshavinum, sum aðrir bara hava droymt um**

SMYRIL LINE HUGLEIÐINGAR
*Jóannes Hansen*



*Óli Hammer og frú saman við øðrum, tá nýggja Norrøna kom á føroyskar hendur.*
*Mynd Jan Müller*

Seinastu tíðina hava Smyril Line og Norrøna verið eitt av mest umrøddu málunum í samfelagnum. Felagið hevur verið í kreppu, og krepputilfar er gott fjølmiðlatilfar. At málið eisini hevur verið umrøtt í hetlendsku og norsku pressuni, hevur ikki gjørt tað minni áhugavert og atkomuligt hjá føroysku pressuni at snara og venda spurningunum, um nú skipið mundi fara at verða selt, um fremmandir partaeigarar mundu fara at seta meiri í, um skipið mundi fara at skifta heimstað, og um siglingin harvið mundi fara at hava annan miðdepul enn Føroyar. Og um broytingar í felagnum mundu fara at hava við sær, at leiðslan í felagnum fór at verða skift út.

Tað er ikki undur í, at áhugin fyri Norrønu og Smyril Line er stórur. Felagið fór í 1983 við ta tíggju ára gomlu Norrønu, sum var keypt úr Svøríki, og sum nú er vorðið trúboðanarskip, undir rutuna í Norðuratlantshavinum, sum fleiri høvdu droymt um, uttan at tað nakrantíð gjørdist veruleiki. Síðstu tíðina, áðrenn skipið varð selt til Føroya, sigldi tað millum Trelleborg og Travemünde.

Smyril Line bygdi á royndirnar, sum síðani 1975 vóru gjørdar við Smyrli, ið Strandferðslan við Finnboga Ísakson og Tummasi Arabo á odda og ivaleyst væl stuðlað av Atla P. Dam, løgmanni, sála, hevði keypt frá Mols felagnum í Danmark.

At føroyingar fyri tredivu árum síðani umframt til Danmarkar fingu fast sjóvegis ferðasamband til Íslands, Skotlands og Noregs var einki minni enn ein kollvelting. Hesa seinastu tíðina hevur lítið verið at sæð og hoyrt um hetta. Tí verður róð aftur á aftur, nú slóðarin ikki longur verður á brúnni.

Tað var tá ið Strandferðslan fór undir uttanlandssigling, at familjan Føroyar, sum ikki so langt frammanundan hevði fingið bil, fyri rættuliga rímuligan kostnað fekk møguleikan at ferðast í grannalondini at halda summarfrí og hyggja seg um, og tey vóru mong, sum tóku av.

Vinnulívið nýtti serliga farleiðina til Skotlands. Hon tóktist vera í skjótari menning, tá ið Teistin, ið var seinna Mols skipið, sum Strandferðslan hevði keypt, brádliga varð seldur. Ferðasambandið til Skotlands og Bretlands hevur síðani Teistin var seldur verið vánaligt og kostnaðarmikið. Onkur helt fyri, at avreiðingin av ferðasambandinum tann vegin kendist á sama hátt, sum tað hevði havt gjørt, um motorvegirnir suður ígjøgnum Jylland og um týska markið høvdu verið avgrivnir.

### Stóra takið

Óli Hammer var skipari á Smyrli tey fyrstu árini, og hann stovnaði í november í 1982 saman við øðrum, ið høvdu verið uppií, Smyril Line. Í juni í 1983 varð umbygda Gustav Wasa, sum nú hevði fingið navnið Norrøna, sett í sigling millum Føroyar, Ísland, Hetland, Danmark og Noreg.

Fyrstu árini vóru tung. Ymsar royndir vórðu gjørdar fyri at fáa inntøkur vetrarmánaðirnar, og onkra ferðina mundi tað vera um reppið, at skipið glapp føroyingum av hondum. Men tað eydnaðist at varðveita skipið og týdningarmiklu rutuna.

Í 1995 vórðu fyrstu hugsanirnar frammi um at byggja nýtt skip. Gamla Norrøna var 22 ára gomul, og nógva siglingin og økta ferðingin høvdu við sær, at tað var eyðsæð, at okkurt mátti gerast, um haldast skuldi fram við siglingini. Í 1998 varð avgerð tikin um at sigla til Hanstholm alt árið, og tá varð eisini avgerð tikin um at fara undir byggingina av nýggjum skipi.

700 milliónir fyri eitt skip ljóðaði av nógvum. Men hóast tað bara eru sjey ár síðani, so vóru tíðirnar væl øðrvísi tá, enn tær eru nú. Alivinnan tóktist eiga ljósa framtíð og roknaðist at skula syrgja fyri 20-25 prosentum av útflutninginum, og harvið vóru trailararnir nógvir at føra. Oljuprísirnir vóru so nógv lægri, enn teir eru nú, og fleiri aðrir parametrar, sum nú eru ímóti, vóru við.

10. apríl í 2003 varð Norrøna sett í sigling, og eingin føroyingur er sloppin undan tíðindunum um, at tað ikki hevur hilnast soleiðis, sum tað varð vónað. Nú tykist tað sum um, at Norrøna verður varðveitt á føroyskum hondum, og tað fegnast føroyingar um, hóast tilknýti hjá tí einstaka ikki kennist eins tætt nú, sum tað gjørdi, tá ið ein stórur partur av fólkinum vóru partaeigarar og fingu avsláttur í gjaldinum fyri ferðaseðlarnar.



*Vælkomin og farvæl. Nýggja og gamla Norrøna møtast á víðum havi*
*Mynd Jan Müller*

### Persónligu royndirnar

Smyril Line hevur ikki spunnið gull av ferðunum hjá undirritaða á rutunum í Norðuratlantshavinum. Í sjeyti árunum varð ein ferð gjørd til Íslands við Smyrli, og í 1976 varð ein minnilig ferð gjørd til Skotlands saman við tveimum ungdómsvinum í Klaksvík. Annar teirra hevur í nógv ár verið maskinstjóri umborð á Norrønu. Tá ið vit hittast, verður ikki so sjáldan minst aftur á ferðina, tá ið tað, eftir at vit høvdu koyrt suður ígjøgnum Skotland og vestur á Liverpool leiðina - stakst upp á okkum at fara við ferjuni til Norðurírlands. Vit endaðu í miðbýnum í Belfast, har bretska



*Merkið vundið á stong á nýggju Norrønu, tá ho...*
*fyrsta túrin til Føroya.*
*Mynd Jan...*

herliðið spurdi, um vit vóru rættsiktaðir og bað okkum sum skjótast sleppa okkum burtur úr spentu støðuni í norðurírska høvuðsstaðnum og suður um markið til Írlands!

Miðskeiðis í níti árunum var farleiðin til Aberdeen hent at flyta aftur og fram við. Tað segðist, at Smyril hevði so stóran týdning fyri okkurt felag í Aberdeen, at tað hvarv úr býnum, tá ið Strandferðslan gavst at sigla tann vegin.

Á ferð til Danmarkar við Norrønu fyrrapartin av níti árunum kendist tað trongligt, og tískil kom hugsanin um nýtt og betri skip ikki púra óvart, tá ið hon gjørdist almenn.

Tá ið børnini eru vorðin vaksin, broytist ferðingarmynstrið. Í fjør fóru vit bæði við stásiligu